


Kelda Jarðfeingi

# Jarðfeingi: Oljan liggur djúpri

**Jan Müller**

27.06.2014 - 15:15

Oljan.fo

Hóast eingi kolvetni vórðu funnin í seinastu boringini á føroyska landgrunninum, so benda nýggju jarðfrøðiligu metingarnar á, at møgulig kolvetni liggja djúpari enn boriskyldan var.

Hetta skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu.

Jarðfeingi sigur eisini, at tað hevur verið ein stór avbjóðing at bora í hesum jarðløgunum.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, sum var partur av boringini, sigur í eini viðmerking til virðisbrævamarknaðin, at tað var eitt vónbrot, at borurin ikki rakk niður á Vaila sandsteinsmálið. Atlantic Petroleum vísir eisini á, at boringin tøkniliga var ein avbjóðing.

Jarðfeingi vísir annars á tess heimasíðu, at Statoil sum fyristøðufelag helt sína boriskyldu og kom niður á 4542 metrar.